*Framhald av síðu 31*

ikki longur vóru gjørd til so sjúk og røktarkrevjandi sjúklingar.

Toymini veita trygd fyri, at hesi menniskju fáa neyðugu hjálpina. Meiningin er, at tílík toymi eru mobil og fara út úr sjúkrahúsunum eisini. Tey vitja bæði hospice, (sum finnast aðrastaðni, men ikki í Føroyum), privatu heimini og sergjørdar seingjareindir til doyggjandi á sjúkrahúsum ymsastaðni í Danmark. Her vegleiða tey starvsfólk, sjúklingar og avvarandi og halda eyguni við fakligum mannagongdum.

## Doyggjandi uttanfyri heilsuverkið

Okkara heilsuverk í dag er sett saman, sum tað danska við somu effektivitetskrøvum, men har vit ikki eru komin so langt í nýggja palliativa hugburðinum inna linna- og umsorganarviðgerð. Fylgjan av hesum er, at bert sjúklingar, sum kunnu bjargast, eru vælkomnir á sjúkrahús.

Sjúkrahúsini vilja sleppa av við sjúklingin aftur. Annars verður missiónin roknað at vera miseydnað. Sjúklingar, sum ikki kunnu bjargast, eru tungir, eru ein byrða, oyðileggja tað fyri øll hini, ið kunnu gerast frísk aftur, órógva starvsfólkið, fylla í skipanini og kosta alt ov nógva tíð og pening.

Niðurstøðan av hesum hugburði og effektiviseringsskipan er, at doyggjandi skulu lúka somu treytir sum tey, ið hava lívið framman fyri sær. Og soleiðis verða tey gandaði burt úr eygsjón.

Viðgerðin er liðug, tá kroppurin ikki longur er tengdur at einum tóli. So mugu tey upp úr seingini, so seingjadagatalið kann fara niður. Men hvussu er so skilið eftir heimkomuna? Jú, tá er tað heimarøktin, ið eftir besta førimuni kann taka yvir, uttan serliga vitan um sjúklingin, uttan leiðbeining og má dúva uppá eina kommunulæknaskipan, ið kanska ikki hevur samband við sjúklingin vanliga.



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, ynskir at savna blómurnar í heilsuverkinum til eitt blómutyssi, sum hann kallar tað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyri nógv menniskju verður hetta lívið í ongamannalandi, til deyðin kemur. Avvarðandi mugu kíta seg og hava leiklutin at skumpa sjúklingin millum skipanirnar. Ongin heimarøkt er um næturnar heldur, so tey liggja einsamøll. Tann mest ólukkuliga og óvirðiliga tíðin kemur nú til hesi menniskju, sum síggja, kenna og vita, at skipanin ikki rúmar teimum. Soleiðis verða tey send inn á sjúkrahús, tá ongin torir at hava tey heima meira, og soleiðis verða tey útskrivaði av sjúkrahúsi, tá tey eru liðug við dropp ella aðra tólviðgerð. Soleiðis noyðast fleiri av okkum at síggja tey, vit elska mest fáa ein óvirðiligan og ólukkuligan deyða, har angist og desperatión valdar í eini sundurbýttari skipan, har onki stað er til umsorgan burturav.

## Heilsuverkið er sum eitt blómutyssi

Kronisk sjúk og doyggjandi menniskju í dag verða býtt sundur millum sjúkrahús og nærverkið, har kommunulækni yvirtekur sjúklingin frá sjúkrahúsinum. Spurdur um landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum sær hetta sum ein trupuleika, sigur hann:

– Ja, hetta er ein heilt stórur trupuleiki, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður og samanber heilsuverkið við eitt blómutysssi sum skal bindast saman.

– At sektorarnir eru sundurskildir er bæði skaðiligt fyri sektorarnar sjálvar og heilsuna hjá fólki. Tí er tað av stórum týdningi, at samanhang kemur ímillum nærverkið og landssjúkrahúsið, men eisini innanfyri økini sjálv eru sundurbýtingar. Eitt nú eru røktarheimini sjálvognarstovnar við egnum leiðslum, og eisini innanhýsis á Landssjúkrahúsinum kundi verið betri integratión. Tað snýr seg um resursir og raðfesting, sigur landsstýrismaðurin.

Hans Pauli Strøm ynskir eisini at skapa betri kvalitet innan viðgerð, rehabilitering, skráseting og so framvegis. Hann vísir á, at visiónir og ætlanir fevna runt alla heilsuskipanina. Millum annað er rehabilitering ein háttur at betra lívskvalitet hjá sjúkum ella brekaðum, har samarbeiði millum fakbólkar um sama sjúkling er ætlað sum ein stórur fyrimunur. Munurin er her, at hesi eru frísk og hóast alt hava lívið fyri framman. Rehabilitering til doyggjandi finst sum kunnugt ikki.

## Blóman á Landssjúkrahúsinum

Trupult kann vera at føra ætlanir út í lívið fyri varandi sjúk ella doyggjandi, tí ongin í samlað samskipan og ábyrgd er mótvegis sjúklinginum. Einstøku eindirnar innan heilsuverkið taka bert ábyrgdina av sínum egnu eindum. Og skal brúkrarin setast í miðdepilin, ja, so er hetta ikki heilt nóg mikið til at geva kensluna av heildarviðgerð. Hóast hetta so blóma visiónir um heildarhugsan innan røkt og umsorgan á Landssjúkrahúsinum, har sjúkrarøktarfrøðingar innan krabbasjúkur hava serútbúgving innan júst heildarviðgerð og hugburðinum rundan um »tað heila menniskjað«.

Spurdur um Hans Pauli Strøm veit, hvussu gekst við palliativa toyminum, sigur hann, at hvørki hann sjálvur ella embætisfólkini hava servitan innan eitt nú palliatión. Júst tí er tað umráðandi, at sjúklingaráð taka tílíkt upp og koma við hugskotum, ella at sjúkrahúsleiðslan ger eftirmeting og biður um eyka resursir, um tey mangla hetta fyri at føra ynskið út í lívið.

– Palliativa toymið hevur ikki verið uppi at venda síðani avgerðin um at seta tað á stovn kom í 2005. Tað er sjúkrahúsleiðslan, sum hevur ábyrgdina av at útvikla toymið, sigur landsstýrismaðurin og leggur afturat, at tað er sjúkrahúsleiðslan og læknastjórin, sum skulu fylgja upp og eisini skipa fyri, at tað virkar. Eisini skal eftirmeting gerast út frá einum læknafakligum støði. Tann politiska ætlanin var, at allir sjúklingar skuldu fáa gagn av palliatión, sigur Hans Pauli Strøm.

Hevði náttarvaktskipan verið ein partur av nærverkinum, so kundi verið møguligt hjá toyminum at rokkið út til brúkaran tann vegin. Men ongin náttarvakt finst enn.

Spurdur um landsstýrismaðurin út frá hesum sjónarmiði vildi verið sinnaður at kravt náttarvaktsskipan burturav í nærverkinum, sigur hann, at oftani er tað talan um tørv á resursum og arbeiðsmegi.

– Trupuleikin í meginøkinum er, at ikki nógmikið av røktarheimum vóru bygd rættstundis eitt tíðarskeið, og nú eru ov nógvir røktarsjúklingar, sum ovbyrja heimarøktina. Hetta hevur ført við sær, at resursir ikki eru til eina náttarvaktsskipan í meginøkinum. Tað er eisini ein spurningur um at útvega arbeiðsmegi, sigur Hans Pauli Strøm. Hann nevnir, at tey hava royndarkoyrt náttarvaktsskipan á Sandoy, í Suðuroy og í Eysturoynni, men at hann ikki er sinnaður at tvinga heimarøktina til at innføra náttarvakt í meginøkinum.

Hans Pauli Strøm leggur áherðslu á, at tá heildarætlanin fyri krabbameinsøkið verður klárt einaferð til heystar, verður heildarhugburður við toymi og tvørgangandi samarbeiði tikin við tá.

– Spurdur um hann helt tað kundi verið eitt gott hugskot at latið palliativa heildarumsorgan og heildarhugsan innan krabbameinsøkið bróta sló fyri heildarumsorgan til øll sjúk og doyggjandi í breiðum høpi, sigur Hans Pauli Strøm, at tað er kundi tað væl verið.

Palliativ (linnandi viðgerð) toymi sum hugtak er eitt samanrensl av læknavísund og umsorganarvitan innan pínulinna til serliga krabbameinssjúklingar, men er egnað til øll doyggjandi. Tílík toymi byggja á samstarv millum heilt ymiskar fakbólkar, sum við hvør sínum øki hjálpa, stuðla og taka hond um tann doyggjandi og familjuna. Her arbeiða læknar og sjúkrarøktarfrøðingar saman við sálarfrøðingi, kostráðgeva, presti, fysioterapeuti, sosialrágeva, fyri at umfata øll øki sum røra eitt menniskja. Palliatión og palliativ toymi er sostatt tað nærmasta, vit eru komin holistiskari ella heildarhugsan til í dag, har fakbólkar samstarva og hava sjúklingin í miðdepilinum. Á Landssjúkrahúsinum kom eitt palliativt toymi í 2005. Hetta toymi varð broytt eftir hálvum ári og arbeiðir bert í samband við ambulatoriið í dag, har flestu krabbameinssjúklingar vitja til kontrol og kemoterapi o.s.fr. Toymið er ikki útgangandi, sum vit síggja tað aðrastaðni.

